# Alitíðindi

FISKAALING P/F NR 2 2000 430 HVALVÍK


# Alistøðirnar á sjónum

## Hagtøl fyri 1999

*Andrias Reinert*

## Inngangur

Útflutningurin av alifiski varð í 1999 nærum tvífaldaður, bæði í nøgd og virði í mun til í 1998. Rokna vit kruvdan fisk, flak, royktan fisk o.s.fr. um til vekt av rundum blóðgaðum fiski, svarar útflutningurin í 1999 til heili 39.150 tons av alifiski í mun til 19.988 tons í 1998. Útflutningsvirðið var 880 mill kr. í mun til 448 mill kr. í 1998. Umframt at alt meira fiskur hevur verið settur við, hevur príslegan havt stóra ávirkan á tøkuna í 1999.

Væl av fiski, sum kundi verið tikin í 1998, varð gangandi inn í 1999 vegna vánaliga prísin tá, meðan hinvegin meira enn vanligt varð tikið av heldur smávaksnum fiski seinnapartin av 1999, tá prísurin var góður. Talið av fiski, sum gekk eftir á alistøðunum kring landið við árslok 1999 var 9,3 % størri, meðan samlaða vektin var 4% minni enn við árslok 1998. Munandi fleiri laksasmolt og serstakliga nógv fleiri síl verða væntandi sett við á alistøðunum í 2000.

Ein tøkk til alararnar fyri góða undirtøku við spurnarbløðunum. Í hesum Alitíðindum verður tikið saman um gongdina í vinnuni á sjónum í 1999 við støði í upplýsingunum frá alarunum.

Sum í undanfarnu Alitíðindum, ið hava viðgjørt vinnuna á sjónum, fara vit eisini at hyggja eitt sindur nærri at tølum frá Hagstovu Føroya, sum viðvíkja útflutningi av alifiski.

- Nøkur tøl eru rættað/dagførd, í mun til fyrr komin Alitíðindi. -

# Hagtøl um útseting, goymslu og tøku

**Alistøðirnar**
Trý aliloyvi vórðu endurnýggjað í 1999, soleiðis at 17 feløg umsótu 26 vanlig aliloyvi og høvdu 32 pláss at ala á 31-12-99. Umframt høvdu tvey feløg lívfisk á 3 plássum, og eitt loyvi er til royndir við øðrum fiskasløgum, fyrst og fremst kalva.

**Fiskur farin á sjógv í 1999**
Sambært alistøðunum á sjónum eru góðar 14,5 mill. laksasmolt og sløk millión av sílum farin í alinótirnar í 1999, samanborið við ávíkavíst 12,8 mill. laksasmolt og 513.000 síl í 1998, og 8,6 mill. smolt og 987.000 síl í 1997.

Í Talvu 1 er fiskurin, sum er farin á sjógv, býttur upp eftir aliøki. Skilt er ímillum vár- og heystsmolt og samanborið er við fiskin, sum fór á sjógv frá 1995 til 1998. Aliøkini Vestanfyri og Suðuroy eru tikin undir einum.

*Talva 1. Smolt og sjóbúgvin síl, (tald í 1.000), farin á sjógv í 1999.*

| | Vár | | Heyst | |
|---|---|---|---|---|
| | Laksur 1000 stk | Síl 1000 stk | Laksur 1000 stk | Síl 1000 stk |
| Norðoyar | 1.654 | | 2.109 | |
| Eysturoy E. | 1.606 | | 1.379 | 111 |
| Miðøkið | 1.675 | | 2.797 | |
| Vestf./Suðuroy | 2.177 | 117 | 1.141 | 702 |
| Íalt í 1999 | 7.112 | 117 | 7.426 | 813 |
| Íalt í 1998 | 5.086 | 143 | 7.685 | 370 |
| Íalt í 1997 | 3.435 | 117 | 5.211 | 870 |
| Íalt í 1996 | 3.445 | 36 | 3.838 | 310 |
| Íalt í 1995 | 4.116 | 441 | 3.643 | 145 |

Tølini í talvuni omanfyri eru bruttotøl. Svinnið tríggjar teir fyrstu mánaðirnar á sjónum er sostatt ikki drigið frá.

Býtið millum vár- og heystsmolt og talið av sílum, sum eru farin á sjógv frá 1991 er lýst á Mynd 1. Somuleiðis er ein forsøgn, sum vísir, hvussu mong laksasmolt og ælabogasíl, alistøðirnar hava ætlan um at koyra í nótirnar í 2000.




*Mynd 1. Tal í milliónum av vár- og heystsmoltum og av ælabogasílum, sum eru farin á sjógv seinastu 9 árini. Talið av smoltum, sum fara á sjógv fyrrapart á ári, er aftur farið at nærkast talinum, sum fer á sjógv seinna hálvár. Forsøgnin fyri ár 2000, eigur at vera tikin við neyðugum fyrivarni.*

**Fiskur í sjónum 31.12.1999**

Eingin fiskur av 1997 árganginum gekk eftir við árslok 1999. Tal og vekt av 1998 og 1999 árgangunum av laksi kring landið um árskiftið 1999/2000 er sett saman í Talvunum 2a - 2b. Skilt er ímillum aliøkini og somuleiðis millum fisk, sum er farin á sjógv fyrra- og seinnapart á ári, her nevnt vár- og heystsmolt. Ælabogasílini eru tald saman fyri alt landið í Talvu 2c. Fyri at fáa eina ábending um gongdina í vinnuni er samanborið við støðuna við árslok fýra undanfarnu árini.

*Talva 2a. Laksur í sjónum, 1998 smolt-árgangur 31.12.1999.*

| Aliøki | Vársmolt | | | Heystsmolt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tal 1000 | Kg/ Stk | Tons | Tal 1000 | Kg/ Stk | Tons |
| Norðoyar | 422 | | 1.940 | 1.228 | | 2.734 |
| Eysturoy E | 712 | | 3.252 | 2.028 | | 5.015 |
| Miðøkið | 92 | | 320 | 1.040 | | 2.195 |
| Vestanfyri/Suðuroy | 178 | | 778 | 594 | | 1.111 |
| Árg.98 pr.31.12.99 | 1.404 | 4,5 | 6.290 | 4.890 | 2,3 | 11.055 |
| Árg.97 pr.31.12.98 | 1.680 | 4,5 | 7.478 | 4.223 | 2,4 | 10.298 |
| Árg 96 pr.31.12.97 | 1.251 | 4,3 | 5.358 | 2.561 | 1,9 | 4.882 |
| Árg.95 pr.31.12.96 | 1.540 | 4,7 | 7.346 | 2.521 | 1,4 | 3.532 |
| Árg.94 pr.31.12.95 | 1.738 | 3,9 | 6.818 | 933 | 1,2 | 1.126 |

Orsakað av góða laksaprísinum seinnapartin av 1999 eru heili 11.052 tons ella 2,3 milliónir laksar av árgangi 1998 tiknir veturgamlir í 1999, meðan hinvegin bert 3.780 tons ella 810000 laksar av 1997 árganginum

vórðu tiknir veturgamlir í 1998 orsakað av áðurnevnda vánaliga prísi seinnapartin av 1998. Sí eisini Talvu 4.

Nøgdin av veturgomlum fiski, sum er farin á sjógv seinnapartin á ári, er nógv økt við árslok tvey tey seinastu árini.

*Talva 2b. Laksur í sjónum, 1999 smolt-árgangur 31.12.1999.*

| Aliøki | Vársmolt | | | Heystsmolt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tal 1000 | g/ stk | Tons | Tal 1000 | g/ stk | Tons |
| Norðoyar | 1.468 | | 1.181 | 1.601 | | 199 |
| Eysturoy E | 1.369 | | 1.172 | 1.185 | | 145 |
| Miðøkið | 2.270 | | 1.844 | 1.787 | | 164 |
| Vestanfyri/Suðuroy | 1.890 | | 1.428 | 897 | | 87 |
| Árg.99 pr.31.12.99 | 6.997 | 804 | 5.625 | 5.470 | 109 | 595 |
| Árg.98 pr.31.12.98 | 4.308 | 985 | 4.243 | 6.844 | 114 | 782 |
| Árg.97 pr.31.12.97 | 3.261 | 1.002 | 3.333 | 4.509 | 132 | 593 |
| Árg.96 pr.31.12.96 | 3.176 | 748 | 2.376 | 3.183 | 83 | 264 |
| Árg.95 pr.31.12.95 | 3.949 | 739 | 2.917 | 2.360 | 80 | 186 |

Miðalvektin á fiskinum, sum fór á sjógv í 1999, er heldur slakari við árslok enn vektin á tveimum teimum undanfarnu árgangunum. Samanlagt rokna alarar við, at 12,5 mill. fiskar eru eftir av teimum 14,5 mill. smoltunum, sum fóru í nótirnar. Svinnið av árgangi 1999 til 31-12-99 er sostatt sløk 14 %.

*Talva 2c. Ælabogasíl í sjónum 31.12.1999*

| | Vársíl | | | Heystsíl | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Pr.31.12.1999 | Tal 1000 | Kg/stk | Tons | Tal 1000 | Kg/stk | Tons |
| Árgangur 1998 | 0,4 | 4,0 | 1,6 | 255 | 2,9 | 743 |
| Árgangur 1999 | 36 | 0,9 | 34 | 858 | 0,5 | 400 |
| Íalt | 36 | | 36 | 1.025 | | 1.125 |
| Síl íalt, vár- og heystsíl við árslok 1999 | | | | 1.149 | 1,0 | 1.179 |
| Síl íalt, vár- og heystsíl við árslok 1998 | | | | 993 | 2,0 | 2.030 |
| Síl íalt, vár- og heystsíl við árslok 1997 | | | | 1.189 | 0,9 | 1.023 |
| Síl íalt, vár- og heystsíl við árslok 1996 | | | | 697 | 1,5 | 1.137 |
| Síl íalt, vár- og heystsíl við árslok 1995 | | | | 927 | 0,9 | 832 |

So at siga øll sílini fara nú á sjógv á heysti, og alarar geva upp, at 894.000 síl eru eftir við árslok av teimum 930.000, sum fóru á sjógv í 1999 svarandi til eitt svinn uppá sløk 4 %. Sum sæst á Mynd 1 verður mett, at millum 4 og 5 mill. av sílum fara á sjógv í 2000.

*Talva 2d. Broytingar í samlaðum tali og vekt av alifiski á øllum alistøðum við árslok frá einum ári til annað.*

| Ár | Tal Laksur + Síl | | | Vekt Laksur + Síl | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tal | Broyting | | Tons | Broyting | |
| | 1000 | 1000 | % | | Tons | % |
| 1999 | 19.910 | 1.698 | 9,3 % | 24.743 | -1.032 | -4,0 % |
| 1998 | 18.212 | 5.356 | 41,7 % | 25.775 | 10.094 | 64,4 % |
| 1997 | 12.856 | 1.602 | 14,2 % | 15.681 | 233 | 1,5 % |
| 1996 | 11.254 | 1.347 | 13,6 % | 15.448 | 3.570 | 30,1 % |
| 1995 | 9.907 | | | 11.878 | | |

Sløk 10 % fleiri fiskar ganga á alistøðunum á sjónum 31-12-99 í mun til um somu tíð árið fyri, meðan vektin harafturímóti er 4 % minni.

Vektin (ella "biomassin") tilsamans av øllum laksinum, sum gekk á alistøðunum í Føroyum, við árslok 1995 - 1999 er avmyndað á Mynd 2.




*Mynd 2. Vektin tilsamans av øllum laksinum, sum gekk á alistøðunum kring landið, og býtið millum árgangirnar við árslok fimm tey seinastu árini. Styttingar V97: vársmolt 1997, H97: heystsmolt 1997 og tilsvarandi fyri hinar árgangirnar.*

## Tøka av alifiski

Í Talvu 3a er yvirlit yvir tað, sum er tikið av laksi í 1999. Vektin er uppgivin sum rundur, blóðgaður fiskur. Skilt er ímillum árgangirnar og millum fisk, sum er farin á sjógv fyrra og seinna hálvár. At meta saman við eru víst tilsvarandi tøl fyri tað sum tikið er frá 1996 til 1998.

*Talva 3a. Laksur tikin í 1999. 1) Fyri onkra støð hava vit mett um tøkuna í 1998. 2) Í 1997 vanta upplýsingar frá tveimum alistøðum. 3) Í 1996 vanta tøl frá einari støð*

| | Fyrra hálvár | | | Seinna hálvár | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Árgangur | Tal 1000 | Kg/ stk | Tons | Tal 1000 | Kg/ stk | Tons |
| Heystsmolt 96 | 132 | 5,6 | 742 | | | |
| Vársmolt 97 | 1.520 | 5,2 | 7.971 | 258 | 5,9 | 1.532 |
| Heystsmolt 97 | 1.589 | 4,4 | 6.942 | 1.973 | 5,6 | 11.011 |
| Vársmolt 98 | 200 | 5,0 | 1.006 | 1.935 | 4,9 | 9.403 |
| Heystsmolt 98 | | | | 141 | 4,6 | 643 |
| Tøka íalt 99 | 3.441 | 4,8 | 16.661 | 4.307 | 5,2 | 22.589 |
| Tøka íalt 98 [1)] | 1.525 | 4,7 | 7.166 | 2.596 | 4,6 | 12.005 |
| Tøka íalt 97 [2)] | 1.183 | 5,4 | 6.332 | 2.606 | 4,7 | 12.151 |
| Tøka íalt 96 [3)] | 1.686 | 4,7 | 7.851 | 1.865 | 4,8 | 9.043 |

Samlaða tøkan av laksi á øllum alistøðunum, sum uppgivin á spurnarbløðunum fimm tey seinastu árini, er sett saman í Talvu 3b.

*Talva 3b. Laksur tikin til samans frá 1995 til 1999.*

| Ár | Tal 1000 stk | Miðalvekt kg | Tons |
|---|---|---|---|
| 1999 | 7.749 | 5,1 | 39.252 |
| 1998 | 4.117 | 4,7 | 19.176 |
| 1997 | 4.138 | 4,9 | 20.306 |
| 1996 | 3.714 | 4,8 | 17.663 |
| 1995 | 2.154 | 3,8 | 8.281 |

Umframt at nógv fleiri laksar eru tiknir í 1999 enn undanfarnu árini, er miðalvektin á fiskinum eisini størri í 1999.

*Talva 3c. Síl tikin til samans frá 1995 til 1999.*

| Ár | Tal 1000 stk | Miðalvekt kg | Tons |
|---|---|---|---|
| 1999 | 871 | 3,8 | 3.292 |
| 1998 | 375 | 3,4 | 1.260 |
| 1997 | 397 | 3,6 | 1.440 |
| 1996 | 307 | 3,0 | 915 |
| 1995 | 30 | 2,6 | 77 |

Nøgdin av sílum, sum er tikin, er vaksin munandi síðani 1995, og sum nevnt verða munandi fleiri síl sett við í 2000 enn undanfarin ár.

# Umrøða av nøgd av livandi fiski, felli og tøku

Sum m.a. sæst á Mynd 1, varð í 1994 farið undir at koyra væl av ljósstýrdum smoltum á sjógv. Munandi partur av hesum ofta smávaksna fiski hevur ikki klárað seg nóg væl, tá hann er komin á sjógv seint á heysti ella á vetri, og tað er óivað ein høvuðsorsøk til stóra svinnið, sum hevur verið á sjónum seinastu árini. Tað seinasta av 1997 árganginum varð tikið í 1999, og í Talvu 4 hava vit gjørt upp, hvussu árgangirnir 1995-97 hava hilnast.

*Talva 4. Svinn á sjónum í 1995, 1996 og 1997 smoltárgangunum.*

| Smoltárgangir : | 1995 árg. 1) 1000 fiskar | | 1996 árg 1000 fiskar | | 1997 árg 1000 fiskar | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vár-/ Heystsmolt : | Vár smolt | Heyst smolt | Vár smolt | Heyst smolt | Vár smolt | Heyst smolt |
| Smolt farin á sjógv- tal | 3.488 | 3.148 | 3.445 | 3.838 | 3.435 | 5.211 |
| Laksur tikin veturgamal | 1.107 | 0 | 1.141 | 51 | 810 | 0 |
| Tikin 1. Hálvár tvævetur | 819 | 266 | 707 | 763 | 1.520 | 1.589 |
| Tikin 2. Hálvár tvævetur | 77 | 1.178 | 191 | 1.595 | 258 | 1.973 |
| Tvævetur eftir pr.31.12. | 0 | 88 | 0 | 163 | 0 | 0 |
| Tikin + eftir í sjónum | 2.003 | 1.532 | 2.039 | 2.572 | 2.588 | 3.562 |
| Svinn pr.31.12, 2.árið | 1.458 | 1.618 | 1.406 | 1.266 | 847 | 1.649 |
| Svinn í % av upprunatali | 43 % | 51 % | 41 % | 33 % | 25 % | 32 % |

1) Tvær alistøðir eru ikki við í tølunum fyri 1995

Hóast svinnið av 1997 árganginum framvegis er stórt, er tó ein góður bati í mun til tveir teir undanfarnu árgangirnar.

**Vøkstur í alivinnuni komandi árini**

Tøka av laksi frá 1996 til 1999 og forsagnir um tøku til og við ár 2002, roknað sum vekt av rundum fiski, er víst sum stabbar á Mynd 3. Av tí at so at siga allur alilaksurin í Føroyum varð tikin tvævetur í sjónum fyrstu árini, og meginparturin enn verður tikin tvævetur, hava vit valt at avmynda talið av smoltum, sum eru farin á sjógv, tvey ár forskotið í mun til tøkuna. Eitt nú eru tær 14,5 mill. av smoltum, sum fóru á sjógv í 1999, vístar sum svarti bletturin oman fyri stabban, sum avmyndar væntaða tøku ár 2001. Forsagnirnar eru gjørdar út frá teimum fortreytum at:

- Heilsustøðan og gongdin í vinnuni verður á sama støði sum tvey tey undanfarnu árini.
- Tøkumynstrið og býtið millum árgangirnar, ið tiknir verða hvørt árið, verður sum í 1999.

- Úrtøkan fyri hvørt smolt, sum er farið og fer á sjógv, verður sum tað í miðal hevur verið seinastu árini.




*Mynd 3. Tøkan av laksi, roknað sum rund vekt, er her avmyndað sum stabbar frá 1996 til og við 1999, og forsagnir um tøku eru gjørdar til ár 2002. Svørtu blettirnir vísa talið av smoltum, sum eru farin á sjógv tvey ár frammanundan tøkuni, og her er somuleiðis forsøgn fyri tal av smoltum ár 2000. Sílini eru ikki við.*

Út frá hesum kann væntast, at tøkan av laksi økist úr sløkum 40.000 tonsum í 1999 til oman fyri 60.000 tons 2002.

# Onnur viðurskifti

**Fóðurnýtsla og brutto fóðurfaktor á sjónum**
Framleiðslan av laksi og sílum til samans á øllum alistøðum, roknað sum vekt av livandi fiski í sjónum frá 1996 til 1999, er í Talvu 5 roknað út frá tøkuni, sum alarar geva upp og frá vektini av fiskinum, sum gongur í sjónum við árslok. Teir, sum selja fiskafóður, hava útvegað tølini fyri, hvussu nógv fóður er nýtt til fiskin hesi ár.

*Talva 5. Roknaður brutto fóðurfaktorur, ella kg av fóðri, sum fer til hvørt kg av alifiski (livandi vekt), sum verður tikið.*

| Ár | Fiskur í sjónum við ársbyrjan Tons | Tøka umrokn. til livandi vekt [1] Tons | Fiskur í sjónum við árslok Tons | Framl. Av fiski í árinum Tons | Fóður nýtt á sjónum [2] Tons | Rokn. Brutto fóður-faktorur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1996 | 11.878 | 20.436 | 15.448 | 24.006 | 28.000 | 1,17 |
| 1997 | 15.448 | 23.865 | 15.679 | 24.096 | 30.100 | 1,25 |
| 1998 | 15.679 | 22.474 | 25.774 | 32.566 | 41.700 | 1,28 |
| 1999 | 25.774 | 46.798 | 24.743 | 45.767 | 56.000 | 1.22 |
| 2000 [3] | 24.743 | *57.200* | *22.300* | *54.757* | *67.000* | *(1.22)* |

1. Tøkan av alifiski, sum alarar hava givið upp (rund vekt x 1.1).
2. Fóður til fisk, sum er misfarin av ymiskum orsøkum er íroknað her.
3. Fiskur í sjónum 01-01-2000, og forsagnirnar fyri 2000 ið eru gjørdar út frá eini meting av, at tað fara at verða nýtt 67.000 tons av fóðuri til alifiskin ár 2000.

Út frá hesari mettu fóðurnýtslu í 2000 og við sama fóðurfaktori sum í 1999 kunnu vit rokna okkum til eina framleiðslu í sjónum uppá 54.757 tons av fiski í 2000. Sambært forsagnunum frammanfyri (sí Mynd 3) verða væntandi tikin góð 50.000 tons rund vekt av laksi í 1999 umframt tøku av sílum, sum er mett til 1.500 tons, roknað sum rund vekt. Tilsamans svarar hetta til eini 57.200 tons av livandi fiski. Nøgdin av fiski í sjónum komandi ársskifti verður í hesum roknidømi heldur slakari enn tvey tey undanfarnu árini.

Hesar metingar omanfyri, mugu, sum vera man, takast við stórum fyrivarni. Eitt nú síggja vit í Talvu 9, at útflutningurin av alifiski fyrstu fimm mánaðirnar av 2000 var 10.610 tons, roknað sum vekt av rundum fiski, ella heili 25 % minni enn sama tíðarskeið í 1999, tá útflutt vórðu 14.125 tons rund vekt.

**Tal av fólki**

Talið av fólki, sum arbeiðir beinleiðis á alistøðunum á sjónum, er í Talvu 6 sett saman við fólkunum, sum starvast á smoltstøðunum. Bæði tey sum hava fast arbeiði og eykahjálp eru roknaði saman í "Ársverk".

*Talva 6. Fólk ið arbeiða beinleiðis á smolt- og alistøðunum*

| Ár | 1999 | 1998 | 1997 | 1996 | 1995 |
|---|---|---|---|---|---|
| Smoltstøðir | 127 | 116 | 99 | 83 | 75 |
| Á sjónum | 140 | 119 | 113 | 117 | 104 |
| Til samans | 267 | 235 | 212 | 200 | 179 |

**Lús**
Í Talvu 7 siga tølini, hvussu mangar viðgerðir árgangurin, sum er oftast viðgjørdur fyri lús á eini alistøð, hevur fingið fimm tey seinastu árini.

*Talva 7. Viðgerðir fyri lús 1995 – 1999.*

| Tal av Viðgerðum | Tal av alistøðum | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | 1999 | 1998 | 1997 | 1996 | 1995 |
| 0 | 2 | 9 | 6 | 5 | 7 |
| 1-3 | 12 | 8 | 9 | 9 | 9 |
| 4-7 | 6 | 7 | 8 | 8 | 5 |
| > 7 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Ikki svarað | 2 | 1 | 3 | 1 | 2 |

Fleiri alistøðir hava viðgjørt fyri lús í 1999 enn undanfarnu árini, og sannlíkt er, at hetta hevur samband við vaksandi nøgdina av fiski í sjónum. Lítið hevur tó verið viðgjørt fyri lús fyrru helvt av 2000.

**Sjúka**
Í Talvu 8 er ein samandráttur av tí, sum alistøðirnar hava svarað spurningunum um sjúku í fiskinum í 1998 og 1999.

*Talva 8. Sjúka og felli í 1998 og 1999.*

| Ár | 1999 | | 1998 | |
|---|---|---|---|---|
| Sjúka | Alistøðir | Felli | Alistøðir | Felli |
| Hjartaklovningur | 1 | ? | 2 | 5 % |
| I P N | 0 | ? | 5 | 6 – 18 % |
| B K D | 11 | 8-31 % | 8 | 5 – 18 % |
| Vetrarsár | 3 | ? | 9 | 4 – 25 % |

**BKD.** Bert ein partur av alistøðunum svarar spurningunum, men hóast upplýsingarnar eru sera ófulfíggjaðar, benda tær á, at fleiri trupulleikar hava verið av BKD í 1999. Fellið, sum er givið upp orsakað av hesi sótt, er : 8-12-15-18-25 og 31 %.

**ILA. – Hetland – Føroyar.**

Í Alitíðindi Nr. 4 1998 varð formaðurin í alarafelagnum í Hetlandi endurgivin (úr Fish Farming International aug.98) at siga, "Fáa vit ILA til Hetlands, kann hon forkoma allari alivinnuni í oyggjunum eftir einum ári". Stutt eftir kom sjúkan til Hetlands.

Lítil ivi er um, at ILA er borin til Hetlands við einum brunnbáti við smittaðum smoltum úr Skotlandi, og allir tilburðirnir í oyggjunum uttan tveir kundu setast beinleiðis í samband við fyrsta tilburðin. Óføra strong tiltøk vórðu alt fyri eitt sett í verk. Vanligt er at hoyra í Skotlandi og Hetlandi, at tað serstakliga vóru hesi tiltøk, sum mynduleikarnir settu í verk, heldur enn sjálv ILA sjúkan, sum gjørdi at fleiri alarar vórðu sera meint raktir fíggjarliga. Yvirhøvur hevur tó nú aftur gingist væl við alingini í Hetlandi, eisini fyrru helvt av 2000 (W. Crowe), og eingin sjúka er staðfest í oyggjunum seinasta árið.

Hetland er óiva tað aliøki, sum minnur mest um okkara viðurskifti, og í Talvu 9 er gjørdur ein samanburður av útseting og tøku í báðum oyggjabólkunum, og okkurt er viðmerkt um gongdina við sjúku í alingini.

*Talva 9. Sammeting av alingini í Hetlandi og Føroyum 1990 – 2000.*

| | Hetland | | | Føroyar | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Smolt Mill. | Tøka 1000 tons | Sjúka | Smolt og síl Mill. | Tøka 1000 tons | Sjúka |
| 2000 | - | **41,0* | | **22,4* | **52,0* | ILA |
| 1999 | 12,7 | **36,4* | | 16,4 | 39,2 | |
| 1998 | 12,6 | 33,3 | ILA | 13,2 | 20,0 | |
| 1997 | 13,3 | 24,6 | | 9,6 | 22,4 | |
| 1996 | 6,2 | 19,7 | | 7,6 | 17,4 | |
| 1995 | 5,8 | 15.5 | | 8,3 | 9,0 | |
| 1994 | 5,0 | 14,4 | | 5,7 | 15,6 | |
| 1993 | 4,6 | 11,7 | | 5,3 | 18,4 | |
| 1992 | 5,0 | 10,7 | | 4,7 | 19,1 | |
| 1991 | 4,6 | - | | 8,6 | 19,8 | Furunkul. |
| 1990 | 4,1 | - | | 6,1 | 12,9 | BKD |

*Forsagnir
Furunkulosan kom til Hetlands undan 1990
BKD hevur ikki gjørt nógv um seg í Hetlandi
Hitrasjúkan gjørdi rættuliga um seg í Føroyum í 1987.
IPN varð fyrstu ferð ávíst í Føroyum í 1985.

Óføra spennandi verður at síggja, um ILA fer at gera um seg í laksa-alingini hjá okkum í heyst og/ella til várs, og hvussu alivinnan í Føroyum sum heild fer at klára hesa avbjóðing, tá hon kemur.

# Útflutningstøl

Vøksturin í prísi á alifiski er lýstur í Talvu 10. Tøl frá Hagstovu Føroya um útflutning av alifiski, flaki og øðrum viðgjørdum vørum úr alifiski til og við mai 2000, eru í talvuni sett saman við útflutninginum fyri árini 1999 og 1998. Útflutningsprísurin fyri hvørt kg. av teimum ymisku vørunum er roknaður fyri hesi tíðarskeið.

Talva 10. Útflutningur av alifiski í nøgd og útflutningsvirði pr. kg.

| Vøruslag | 2000 Jan-Mai | | 1999 | | 1998 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tons | Kr/kg | Tons | Kr/Kg | Tons | Kr/kg |
| Ísaður laksur | 7.133 | 30,09 | 24.129 | 23,17 | 11.397 | 22,80 |
| Frystur laksur | 136 | 25,84 | 2412 | 24,66 | 1.264 | 24,29 |
| Ísað laksaflak | 6 | 59,50 | 237 | 40,00 | 20 | 44,25 |
| Fryst laksaflak | 981 | 53,29 | 3299 | 50,04 | 1.861 | 51,99 |
| Royktur laksur | 124 | 69,67 | 379 | 62,30 | 656 | 61,23 |
| Annar tilv.laksur | 101 | 17,77 | 216 | 15,78 | 163 | 13,86 |
| **Útfl.vekt laksur** | **8.481** | **33,16** | **30.672** | **27,16** | **15.361** | **28,03** |
| *Rund vekt laksur* | *10.295* | *27,32* | *36.981* | *22,53* | *18.987* | *22,68* |
| | | | | | | |
| Ísaði síl | - | - | 209 | 21,81 | 371 | 19,30 |
| Fryst síl | 250 | 28,10 | 1.548 | 27,60 | 471 | 21,69 |
| Sílaflak ís/fr | 1 | 32,00 | 1 | 40,0 | - | - |
| **Ùtfl.vekt síl** | **251** | **28,11** | **1.758** | **26,92** | **842** | **20,63** |
| *Rund vekt síl* | *315* | *22,44* | *2.169* | *21,82* | *1.001* | *17,36* |
| | | | | | | |
| **Útfl.v.alifiskur** | **8.732** | **33,02** | **32.430** | **27,15** | **16.203** | **27,65** |
| *Rund v.alifiskur* | *10.610* | *27,17* | *39.105* | *22,49* | *19.988* | *22,41* |

.

Í Talvu 11a og 11b er alifiskur og vørur úr alifiski roknað um til vekt av rundum blóðgaðum fiski, býtt sundur á londini sum keypa mesta alifiskin úr Føroyum.

*Talva 11a. Útflutningur av laksi, roknaður sum vekt av rundum blóðgaðum fiski, býtt á keyparalond.*

| Tíðarskeið | Jan-Mai 2000 | | 1999 | | 1998 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Land | Tons | Býti% | Tons | Býti% | Tons | Býti% |
| Danmark | 5.698 | 55 | 18.586 | 50 | 11.481 | 60 |
| Týskland | 774 | 8 | 3.760 | 10 | 2.742 | 14 |
| Ísland | 1.493 | 15 | 3.609 | 10 | 651 | 3 |
| Bretland | 931 | 9 | 3.591 | 10 | 1.301 | 7 |
| Frakl./Monaco | 576 | 6 | 3.115 | 8 | 844 | 4 |
| Onnur lond | 825 | 8 | 4.320 | 12 | 2.056 | 11 |
| Laksur íalt | 10.295 | 100 | 36.981 | 100 | 18.987 | 100 |

Danmark hevur í hesum tíðarskeiði keypt meira enn helvtina av føroyska laksinum.

*Talva 11b. Útflutningur av ælabogasílum, roknað sum vekt av rundum blóðgaðum fiski, býtt á keyparalond.*

| Tíðarskeið | Jan-Mai 2000 | | 1999 | | 1998 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Land | Tons | Býti% | Tons | Býti% | Tons | Býti% |
| Danmark | 6 | 2 | 1.176 | 54 | 578 | 58 |
| Japan | 309 | 98 | 898 | 41 | 240 | 24 |
| Onnur lond | 0 | 0 | 95 | 4 | 185 | 18 |
| Síl íalt | 315 | 100 | 2.169 | 100 | 1.001 | 100 |

Alt størri partur av sílunum er farin til Japan í hesum tíðarskeiði.

Í Talvu 12 síggja vit lutfallið millum útflutningin av ísaðum og frystum alifiski í mun til nøgdina av meira virkaðum vørum sum flak, royktan fisk v.m. Nøgdin og virðið av virkaðu vørunum er sera nógv økt í 1999, men roknað sum prosent av samlaðu framleiðsluni, eru tølini smærri enn í 1998 orsakað av ovurstóra vøkstrinum í útflutninginum av alifiski í 1999. Í talvuni er alt roknað um til vekt av rundum fiski.

*Talva 12. Útflutningur av ísaðum/frystum alifiski í nøgd og virði mett saman við útflutning av flaki og meira viðgjørdum alifiski, her roknað um til vekt av rundum blóðgaðum fiski.*

| | Ísaður og frystur alifiskur | | | | Flak og aðrar viðgjørdar vørur | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Vekt | | Útfl.virði | | Vekt | | Útfl.virði | |
| | Tons | % | Mill. Kr | % | Tons | % | Mill. Kr | % |
| 1999 | 31.654 | 81% | 679 | 77% | 7.495 | 19% | 202 | 23% |
| 1998 | 15.067 | 75% | 308 | 69% | 4.921 | 25% | 140 | 31% |
| 1997 | 19.386 | 87% | 399 | 83% | 2.978 | 13% | 84 | 17% |
| 1996 | 13.879 | 80% | 289 | 75% | 3.508 | 20% | 95 | 25% |

Broytingar í prísi á alifiski frá 1990 til 1999 eru lýstar á Mynd 5, sum vísir, hvat útflutningsvirðið fyri hvørt kg. í miðal hevur verið hvørt árið av báðum fiskasløgum roknað sum vekt av rundum blóðgaðum fiski. Miðalprísirnir fimm teir fyrstu mánaðirnar av 2000 eru tiknir við.




*Mynd 5. Broyting í prísi á alifiski frá 1990 til og við mai 2000. Myndin vísir* miðal *útflutningsvirðið í kr. av hvørjum kg av alifiski, roknað sum rund vekt. Prísmunurin millum laks og síl hevur verið úr 72 oyrum upp í 5,79 kr seinastu árini.*

Útflutningsvirðið á aldum fiski frá 1990 til 1999 er víst sum stabbar á Mynd 6, og forsøgn er gjørd fyri ár 2000 og 2001. Útflutningsvirðið uppá 880 mill. kr. í 1999 fór langt upp um besta árið higartil, sum var í 1992, tá útflutt varð fyri slakar 600 mill.kr. Lakasta árið var 1995, tá útflutningurin av alifiski gav 233 mill. kr.




*Mynd 6. Útflutningsvirðið í mill. kr. av aldum laksi og síli til samans frá 1990 til 1999 og forsøgn fyri 2000 og 2001.*

Forsagnirnar um útflutningsvirðið av alifiski og úrdráttum úr alifiski árini 2000 og 2001, eru gjørdar út frá metingunum um væntaða framleiðslu og prísleguni í 1999.

Virðið av útflutta alifiskinum er sett í mun til samlaða útflutningin úr Føroyum frá 1990 til 1998 í Talvu 13.

*Talva 13. Útflutningur av alifiski samanborið við samlaða útflutningin - skip ikki roknað við.- Milliónir kr.*

| Ár | Alifiskur útflutningur Mill. kr | Samlaður útflutningur Mill. kr | Alifiskur av samlaða útfl.virðinum |
|---|---|---|---|
| 1999 | 880 | 3.091 | 28,5 % |
| 1998 | 448 | 2.834 | 15,8 % |
| 1997 | 484 | 2.479 | 19,5 % |
| 1996 | 384 | 2.301 | 16,7 % |
| 1995 | 233 | 1.992 | 11,7 % |
| 1994 | 396 | 2.026 | 19,6 % |
| 1993 | 488 | 2.052 | 23,8 % |
| 1992 | 598 | 2.398 | 24,9 % |
| 1991 | 558 | 2.631 | 21,2 % |
| 1990 | 437 | 2.314 | 18,9 % |

---

**Tøkk til:**

Alararnar fyri góða undirtøku við spurnarbløðunum.
Hagstovu Føroya fyri tilfarið um útflutning.
Teir sum selja fiskafóður fyri upplýsingar um sølu í árinum.
Fiskasjúkutænastuna fyri gjøgnumgongd av brotunum um lús og sjúku.
Manning á Fiskaaling p/f fyri rættlestur, góð ráð og hugskot.
Ingvard Fjallstein fyri viðgerð av hagtølum og gerð av myndum.
Tølini um alingina í Hetlandi eru úr: Scottish Fish Farms – Annual Production Survey – Marine Laboratory Aberdeen, og aðrar upplýsingar frá W.Crowe í juni 2000.